# Pólski stjørnufrøðingurin Kopernikus kollveltir heimsmyndina



**Altjóða stjørnufrøðiár 7**

**Pól Jespersen**

**Stjørnufrøðiliga sæð høpisleysir tekstir, sum jødiska mentanin lænir úr øðrum mentanum, enda í teirri kristnu bíbliuni. Í hondunum á bókstavatrúgvum bíbliulesarum gera hesir tekstir í miðøld vísindunum stóran skaða. Ikki fyrr enn á døgum Kopernikus verður í Evropa bygt víðari á grikska kosmologi. Í 1514 skrivar Kopernikus eitt lítið rit við sjey grundsetningum, sum hann síðan brúkar eini 30 ár at undirbyggja**

Søgufólk kjakast enn um, hvussu myrk miðøldin í royndog veru mundi vera. Stjørnufrøðiliga sæð kann henda tíðin illa lýsast sum annað enn kolsvørt. Fólk flest halda jørðina vera flata sum pannukøkan. Himmalin er eitt "firmament", sum ger skilnað ímillum vøtnini í erva og í neðra. Stjørnurnar sita allar á krystalsferuni í erva, sí mynd. So fastur hevur slíkur hugsanarháttur sitið í fólkum flestum, at sjálvt dekkararnir hjá Kolumbusi vóru óttafullir, sum vikurnar gingu, og einki land var í eygsjón. So sigst, ið hvussu er. Og hetta var í 1492! Var jørðin fløt, var ikki lukkuligt at koma ov nær kantinum! Sjálvur hevur Kolumbus vitað, at jørðin var rund, men hann man hava hildið hana verið minni, enn hon veruliga er. Tað kundi heitið Vesturindia bent á.



**Kenda myndin av miðaldarmanninum, sum kagar út um stjørnusferuna at vita, hvat er uttanfyri.**

**Kopernikus flytur mørk**

Nicolaus Kopernikus var yngstur av fýra systkjum. Foreldrini doyggja bæði, áðrenn hann er fyltur 11 ár. Nicolaus og systkinini búgva eftir hetta hjá mammubeiggjanum í Frauenburg Lucas Watzenrode, sum er kannikur, seinni biskupur.

18 ára gamal fer Kopernikus á akademiið í Krakow. Har lesur hann latín, støddfrøði, landafrøði og heimspeki. Eisini fær hann har innlit í læknafrøði og í stjørnufrøði, sum eftir hetta verður fremsta áhugamál hansara.

Í fleiri ár ferðast hann til lærdar skúlar í Evropa og lesur kirkjurætt, tí mammubeiggin ætlar honum starv í kirkjuni. Í Italia lesur hann grikskt og gongur eisini til fyrilestrar í stjørnufrøði. 9. mars í 1497 kemur mánin fyri stjørnuna Aldebaran. Tá ger hann sína fyrstu stjørnufrøðiligu eygleiðing. Hetta árið verður hann tilnevndur dómharri í Frauenburg og fær eftir tað løn frá kirkjuni, men verður ikki innsettur í starvið fyrr enn í árinum 1500. Ikki fyrr enn í 1506 gevst hann við sínum lærda lestri og ferðingini og ger sær eitt lítið observatorium í einum torni á slottinum Heilsberg, sum er embætisbústaður hjá mammubeiggjanum.

Tíðina býtir hann ímillum embætisskyldur og stjørnufrøðiliga gransking. Vællærdur, sum hann er, og klassiskt skúlaður, er hann førur fyri at lesa griksku meistararnar á upprunamálinum. Í 1514 skrivar hann eina bók, Commentariolus, 20 blaðsíður til støddar. Bókin verður ikki givin út, men verður í handskrivaðum líki býtt út ímillum fólk, hann kennir. Í bókini lovar hann seinni at grundgeva betur fyri sínum sjónarmiðum. Sjey grundsetningar eru kjarnin í ritinum:

1. Himmalknøttirnir ganga ikki um ein felags miðdepil.

2. Miðdepilin í jørðini er ikki miðdepil í alheiminum.

3. Miðdepilin í alheiminum er nærindis sólini.

4. Teinurin ímillum sólina og jørðina er fyri einki at rokna sammett við frástøðuna til stjørnurnar.

5. Dagligu rørslurnar hjá stjørnunum standast av snúninginum hjá jørðini um sína egnu ás.

6. Árliga gongdin hjá sólini stendst av tí, at jørðin melur um sólina. Allar gongustjørnurnar mala um sólina.

7. Øvugtu (retrograd) rørslurnar hjá hinum gongustjørnunum standast av, at tær verða eygleiddar av jørðini, sum flytur seg.

Kopernikus hevði við hesum lagt grundarlagið undir heliosentrisku kollveltingina.



**Pólski kirkjumaðurin og stjørnufrøðingurin Nicolaus Kopernikus, 1473-1543.**

Vanliga siga vit, at uppdagingarnar koma, tá ið tíðin er búgvin. Tað man hon hava verið í Evropa um hetta mundið. Skrivingin hjá Kopernikusi bendir á eitt betri alisfrøðiligt innlit, enn griksku undanmenninir høvdu. Tey, sum hava staðið undir onkrum miðaldar kikjuhválvi í Evropa, mugu ógvast við, at mannahendur hava skapað slíkt. Tað ber ikki annað til, enn at slík kirkjubygging hevur virkað til at menna hetta innlit.